


***Nr. 21*** ***19. oktober 2014*** ***74. árg.***

# Av Taborfjalli oman aftur í dalin

*Men Jesus kom fram at teimum og nam við teir og segði: ”Reisið tykkum upp og óttist ikki!”. Men tá ið teir hugdu upp, sóu teir ongan uttan Jesus einsamallan.*

*Matt. 17,7-8.*

Lærusveinarnir Pætur, Jákup og Jóhannes hava júst upplivað eina undursama hending saman við Jesusi. Hann hevði tikið teir við sær niðan á eitt høgt fjall. Har vóru teir einsamallir saman við honum. Har uppi á fjallinum høvdu teir sæð Jesus umbroytast. Andlit hansara skein sum sólin, og klæðini gjørdust hvít sum ljósið. Teir sóu hann tosa við Móses og Elia. Nú var onki fjalt longur, lógin, profetarnir - alt umbroyttist. Teir hildu, at soleiðis fór tað altíð at vera!

Men nei. ”Reisið tykkum upp og óttist ikki!”

Tá sóu teir bara Jesus einsamallan. Og teir máttu oman aftur av fjallinum, oman hagar, sum lívið verður livað bæði við góðum og ringum. Men hesa stórbæru uppliving skuldu teir hava við sær og liva uppá. Teir gloymdu hana, ið hvussu so er, aldri. Tað var eins og umbroytti hon teirra lív, bar teir og hjálpti teimum, tá ið á stóð.

„Reisið tykkum og óttist ikki!“ segði Jesus tann dagin við Pætur og hinar báðar. Og so tók hann teir við sær oman av fjallinum. Oman hagar, har enntá Pætur ivaðist um Jesu vald, og har hann avnoktar Jesus og ikki vil kennast við hann, men har tað kortini er møguligt at liva undir teim korum, sum hoyra lívinum til í glæmuni frá tí ævinleikanum, sum Gud læt teir síggja hin dagin uppi á fjallinum, tí Jesus verður allan vegin við í ferðalagnum.

Tað er tað, sum vit skulu hoyra, eisini tá ið vit onki skilja og ongum fáa greiði á: At Jesus fer í fylgi við okkum oman av

fjallinum og er við okkum allan vegin bæði í lívi og deyða. Og tað er hann eina, sum vit skulu síggja og hava sum leiðara gjøgnum lívið her.

*Eg vil fylgjast við tær, kæri frelsari mín,*
*tín er leiðin, sum ganga eg vil!*
*Eg vil fylgjast við tær, ger meg*
*lærisvein tín,*
*so eg alla tíð minnast skal til:*
*tín egin eg eri og verði!*

*Eg vil fylgjast við tær, ver mær altíð við lið,*
*hoyr eg bønliga heiti á teg:*
*lat við lívslok mítt meg kunna*
*hvíla í frið',*
*til tú nevnir í dýrd tíni meg!*
*Tá æviga við tær eg livi!*

# Sorg

*Í 1. Pæt. 5,7 stendur skrivað: "Kastið alla sorg tykkara á hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum."*

Alla sorg! Hvør hon so er. Tímilig ella andalig, sorg fyri einum av tínum, útkomu tíni, framtíð tíni, fortíð tíni, synd tíni. So satt sum tað er okkurt, sum tyngir teg og ber tær sorg: kasta hana á Harran!

Gakk ikki og goym hana, sum var hon okkurt virðismikið. Lat ikki sorgina níva teg og boyggja teg til jarðar. Kasta hana frá tær sum okkurt, ið ikki viðkemur tær.

Tí Harrin hevur umsorgan fyri tær. Tú liggur honum at hjarta. Hann kennir sorg tína, sum skuldi hann sjálvur átt hana. Hann vil taka sorgina frá tær og geva tær kraft í staðin.

Far tí sorgleysur til dagsins verk, tí Gud hevur lovað at hava umsorgan fyri tær.

*t.* týddi.

---

*Hoyrt í Havn:*
"Sig bara við Gud, hvat ið tú vilt hava meg at gera! So geri eg tað og fari hagar, ið tú sendir meg!" Soleiðis bað ein maður nú eitt kvøldið. Tá hevur tú av sonnum givið teg heilt yvir til Kristus, tá ið tú kanst biðja soleiðis.

*e.c.*

# Eldvitni

Tá ið stórir meistaraskapir sum OL byrja, verður eldurin kyndur, og hann brennur so leingi, sum teir olympisku leikirnir vara.

Tá ið eldurin brennur, hendir nakað, sum hevur stóran týdning. Gud talar gjøgnum eldin. Móses varð kallaður gjøgnum hin brennandi tornarunnin. 2. Mós. 3,2 Tornarunnurin brann og brann, men brendi ikki upp Tornarunnurin vakti ongan ans, men eldurin gjørdi tornarunnin til eina óvanliga sjón.

Tað er, sum Gud sjálvur vil siga við Móses: "Soleiðis sum tornarunnurin brennur, soleiðis skal eldur mín brenna gjøgnum teg, og tú skalt vera eitt eldvitni fyri meg. Tí skalt tú fara til Fárao og leiða fólk mítt út úr Egyptalandi. Mósesi tørvaði eina sterka uppliving og eitt sterkt kall fyri at taka ímóti avbjóðingini.

Tá ið Gud skuldi vísa, um hann var sannur ella ikki, um hann svaraði bønum ella ikki, var prógvið eldurin, sum kom niður av Himli. "Ákallið tit tá navn guds tykkara, og eg skal ákalla navn Harrans. Tann gudur, ið tá svarar við eldi, hann er Gud!" Tá svaraði alt fólkið og segði: "Henda ætlanin er góð!" 1. Kongb. 18,24. Gud svaraði við eldi, og tað varð opinberað, at eingir gudar eru til uttan Hann!

Tað var eldurin, sum vakti Móses, og sum boðaði frá, at okkurt týdningarmikið fór at henda. Tað var eldurin á fyrsta hvítusunnudegi, sum broytti lívið hjá lærusveinunum og framtíð teirra. Bangnir og innanhoknir lærusveinar vórðu fullkomiliga broyttir. (Áps. 2,1-4) Eldtungur settu seg á hvønn einstakan teirra. Gud sendi eldin.

Endamálið við eldinum er at festa eld í okkum, soleiðis at vit brenna – men verða ikki útbrend. Endamálið er, at vit fáa útint tað, Harrin vil við lívi okkara. Tað er syrgiligt og álvarsligt, tá ið vit kristnu halda, at vit kunnu klára okkum uttan Guds eld. Vit eru smá og avmarkað. Eldurin er tendraður. Eldurin er sendur. Lat Heilaga Andan arbeiða ígjøgnum teg. Tá henda yvirnatúrlig ting, og tað verður opinberað, at Gud sanniliga er okkara millum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Fyrigeving

*Í Matt. 9,2 stendur skrivað: ”Syndir tínar eru tær fyrigivnar.”*

Ongi orð eri eg glaðari um at hoyra av Jesu munni enn hesi. Eg hevði fegin viljað verið tann, sum lá við Jesu føtur, og eygu Frelsarans fest á meg, kanska enntá við fingri sínum vísandi á meg og so hoyra hesi orðini: ”Syndir tínar eru tær fyrigivnar!”

Men Jesu orð eru ævinlig. Tey galda eisini í dag, og tey eru ætlað mær. So satt sum eg eri ærlig(ur) fyri honum. O, tann sæla! Syndir mínar eru fyrigivnar!

Onki er so ræðuligt sum synd mín. Tey ræðuligu føllini og tær dagligu syndirnar. Onki kann níva meg sum tær. Føllini gera himmalin døkkan og taka gleðina frá mær. Fordømdi Gud meg til hin ónda stað, hevði hann havt rætt til tess, og eg hevði havt tað uppiborið.

Men so sigur Gud: ”Syndir tínar eru tær fyrigivnar!” O, tann gleði! O, tann sæla! O, tann himmal!

*t.* týddi.

## Bjargingarætlan

Fyri 2000 árum síðani sótu nakrir menn í Jerusalem eftir at hava tikið ímóti uppgávuni at fara út í allan heim. Hetta vóru 12 vanligir menn við heilt vanligum lívi. Men teir høvdu upplivað Jesu kærleika. Tá ið hann bað teir um at blíva sínar eftirfylgjarar, byrjaði ævintýrið í teirra lívið – tí teir komu við einari bjargingarætlan til alla jørðina! – Teir flestu góvu lív sítt í hesari uppgávuni, uttan serligan heiður og gildi. Stríð og slóðbrótandi arbeiði var gerandisdagur teirra. Mangar staðir á jørðini hava ættarlið fylgt somu áheitan, og í dag hevur helvtin av verðini hoyrt um Guds bjargingarætlan.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19. okt. | Tekstur: | 1.Mós. 28, 10-22; | bíbliuorð: | 5. Mós. 4,39 |
| 26. okt. | Tekstur: | 1. Mós. 29,1-30+31,2-3+33,1-11; | bíbliuorð: | 1. Mós. 31,3 |
| 2. nov. | Tekstur: | Opb. 7, 13-17+21,1-5; | bíbliuorð: | Áps. 2,21 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 22* **2. november 2014** *74. árg.*

# Frelsunnar vegur

*Sæl eru tey í andanum fátæku, tí at himmiríki er teirra*
*Matt. 5,3.*

Ein professari hevur sagt: ”Tann átrúnaðarligi spurningurin er óloysiligur, men lívið var ikki vert at liva, um tann átrúnaðarligi spurningurin ikki var til.” Tað ljóðar løgið, men latið okkum hugsa eitt sindur meira um hetta.

”Tann átrúnaðarligi spurningurin kann ikki loysast.” Hví ikki? Tí vit okkara altíð fer at mæla ímóti tí, sum ber av øllum viti. Har afturat kemur, at vit liva í einum heimi, har tvær maktir berjast í okkum og um okkum. Tann sterki og tann sterkari, sum Jesus málber seg. Um vit okkara skal gera av, hvør er tann sterkari, er ongin ivi um svarið. Harumframt verður altar bygt fyri einum ókendum gudi, og úrslitið verður ein útvatnaður átrúnaður, sum gongur til grundar í deyðans meldurstreymi.

”Lívið var ikki vert at liva, um átrúnaðarligi spurningurin ikki var;” tað er ein ærlig ásannan. Hjartað spyr eftir ævigum virðum, hóast avgjørdu mótstøðuna hjá vitinum. Tað spyr eftir einum óvikandi grundvølli og biður eftir, at rættvísin at enda fer at sigra. Tá ið tú ert komin heilt út til ytsta endamark á meiningsloysinum, mást tú velja ímillum vónloysið og trúnna.

Tá er bakgrundin skapað, har Kristus kann koma til orðanna. Hann kemur okkum á møti og sigur: ”Sæl eru tey í andanum fátæku, tí at himmiríkið er teirra. Ikki tørvar teimum frísku lækna, men teimum, ið ilt hava.” Eina aðrastaðni sigur hann: ”Óttast ikki, trúgv eina!” Hetta er lopið út á 70.000 favna dýpi, og tað er eitt váðaverk, sum má roynast ferð eftir ferð. Trúgv eina! ”Trúgvið á meg!” sigur Jesus. Torir tú? Vilt tú? – Um tú loypur út á Guds

náðar dýpi, skalt tú sanna, hvat tað merkir: hann greip meg og helt mær. – Soleiðis er átrúnaðarligi spurningurin ikki loystur, men frelsunnar vegur er funnin.

*Jesus aleina meg syndara loysti,*
*tá ið eg drivin av neyð kom til hann.*
*Hann lovaði: eg nú vil geva tær treysti,*
*bert tú í trúnni nú halda teg kann!*
*Jesus er klettur, eg nú byggi á;*
*um alt gongur undir, eg fast tó skal stá.*

# Hvíldarstaðurin

*Í Jeramia 31,2 stendur skrivað: "So sigur Harrin: Fólkið, sum komst undan svørðinum, fann náði í oyðimørkini; á hvíldarstað sín skal Ísrael koma aftur."*

Í dag kemur Harrin til tín, at tú skalt koma aftur á hvíldarstað tín. Tú skalt ikki vera so friðleys(ur), so fjálturstungin og óttafull(ur). Tú skalt koma aftur á hvíldarstað tín og fáa hvíld.

Tí, sum tú óttast, ert tú frelst(ur) frá. Tú ert komin undan svørðinum, sigur Harrin. Tí svørði – hvat slag tað so er – sum hekk hóttandi yvir tær. Tí, sum rópaði yvir teg hevndarhug, vanlukku og alt ónt. Tað svørðið er tikið burtur, tí tú hevur funnið náði í oyðimørkini.

Tó at tú kennir teg sum í eini oyðimørk, ert tú tó undir Guds tokka. Tú kanst skifta ótta tín um við gleði, og títt friðloysi við ró og hvíld. Tí í dag hoyrir tú orðini: Tú hevur funnið náði í oyðimørkini. Á hvíldarstaðir skal eg leiða teg.

*t.* týddi.

# Sagt um Bíbliuna

Sum barn varð eg lærdur bæði Bíbliuna og Talmud. Eg eri jødi. Men eg eri hugtikin av lýsandi mynd Nasarearans. Jesus er ov stórur at vera heilaspuni hjá tí, sum skrivað hevur.

Ongin kann lesa evangeliini uttan at hoyra fótafet hansara. Stórleiki hansara býr undir hvørjum orði. Ongin søgn kann skapa hetta lívið.

Onki menniskja kann avnokta, at Jesus hevur verið til, ella at í orðum hansara býr ein undurfagur vakurleiki.

*Albert Einstein / t.* týddi.

# Fá sum frægast burturúr

*"Havi umsorgan fyri landinum, sum eg havi herleitt tykkum til ... tí at eydna tess er eydna tykkara."*

*Jes. 29,7.*

Ert tú stødd á einum staði á tínari lívsleið, har tú ikki vilt vera? Gud hevur eitt orð til tín ... men tað er ikki vist, at tú vilt hoyra tað. Tað er eitt orð, Jeremia gav fólki sínum, tá ið tey vóru trælir í Bábel, langt burturi frá øllum tí, tey elskaðu: "Fyrireikið tykkum til at verða verandi í Bábel! Byggið hús og búgvið í teimum; leggið inn urtagarðar og etið ávøkst teirra! Takið tykkum konur og gitið synir og døtur; takið sonum tykkara konur og giftið burtur døtur tykkara til tess at føða synir og døtur, so at tit fjølgast har og ikki fækkast! Og havið umsorgan fyri landinum, sum eg havi herleitt tykkum til, og biðið fyri tí til Harrans; tí at eydna tess er eydna tykkara." Jer. 29,5-7.

Ísraelsmenn vóru í útlegd, tí Gud hevði loyvt, at teir vórðu hertiknir. Kundi tað hugsast, at tú ert har, sum tú ert stødd í dag, tí at tað er Guds ynski at vælsigna tey, sum eru uttan um teg? Staðin fyri at gevast á hondum og bara bíða eftir, at hetta ringa skilið skal batna, so skuldi tú farið at sáa tað inn í lívið hjá øðrum, sum tú fegin vilt heysta í tínum egna lívi. Hví? Tí tú fert at verða signað, um tey verða tað! Hvussu kunnu vit vita tað? Tí Jesus segði: "Gevið, tá skal tykkum verða givið; eitt gott, stappað, stungið, høgrokað mál skulu tey geva tykkum í fang; tí at við tí máli, sum tit mála, skal tykkum aftur verða mált!" Luk. 6,38.

Martha Washington segði: "Eg havi tikið ta avgerð at vera glað í øllum lívsins viðurskiftum. Eg havi upplivað og roynt, at meginparturin av okkara eydnu ella líðingum ikki kemst av, hvussu vit hava tað, men hvussu vit taka tað." Hatta ljóðar, sum er tað Paulus, ið talar: "... eg havi lært tað loyndarmál at vera nøgdur undir øllum umstøðum..." Fil. 4,12. Um tú heldur vilt trívast enn bara yvirliva, fá so sum best burturúr tí, Gud hevur sett teg í.

*"... et Ord til Dagen" Effie Campbell* umsetti.

---

Tann, sum onga sanna gleði hevur, tuskar runt eftir stuttleikum.

*e.c.* ums.

# *Fyribils visum*

Gloym ikki, at tú bara ert her upp á eitt fyribils visum! Alt heimsins fjant og fjas, so sum feittsúgving, andlitslyfting, varrafylling, heiður og æra, eydna og hepni og tíni jarðisku klæði koma ikki at vara ævigt.

Mong taka lívið sum eina sjálvfylgju. Ger okkurt við lívið, áðrenn lívið ger okkurt við teg. Bjóða Jesusi inn í títt hjarta, áðrenn deyðin kemur og tekur teg úr landi teirra livandi.

Øll menniskju hava fingið eitt tímaglas í vøggugávu; men eingin okkara veit, hvussu nógvur sandur er í ovara glasinum, og hvussu nógv sandskorn eru eftir, til glasið er niðurrunnið.

"Eg eri ikki ein kristin; men eg havi mína barnatrúgv," havi eg hoyrt mong siga. Tað er loyvi at hava barnatrúgv, men at vera kristin verður meira umfatandi og bindandi.

Minnist tú, tá ið missiónshúsini kring landið vóru á tremur við fólki og hin hjartanemandi lovsongurin boðaði evangeliið um Jesus, so tað brann í hjørtunum og gav afturljóð í samfelagnum? Tað vóru eldhugaðar prædikur, sum peikaðu á Jesus og eggjaðu øllum at gera upp við syndina og liva eitt gudsóttandi lív.

Bjóða Jesusi inn í títt hjarta. Hann hevur goldið fyri alla tína synd. Hann hevur gjørt tær ein fínan bústað til reiðar í himli. Men tú mást gera tað nú, í dag, tí tað eru tveir vegir út úr hesum heimi, og vit hava ikki fingið nakra kvittan fyri, at vit skulu fáa morgindagin.

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2. nov. | Tekstur: | Opb. 7,13- 17+21,1-5; | bíbliuorð: Áps. 2,21 |
| 9. nov. | Tekstur: | Matt. 28,18-20+ Mark. 10,13-16+1.Pæt.1,3; | bíbliuorð: Mark. 16,16a |
| 16. nov. | Tekstur: | Matt. 26,26-29; | bíbliuorð: Jóh. 6,48 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74